**Rætting til útboðstilfar**

Í útboðstilfarinum er ráðgevingin, ið KT-landsins, Gjaldstovan hevur fingið, í stóran mun fylgd.

Heðin Ejdesgaard Møller, ið er nevndur sum ráðgevi, hevur ynskt, at vit fráboða undir útboðnum, at hann tekur ikki undir við endaligu útgávuni av útboðstilfarinum, grundað manglandi objektivitet í vektingini og ógreið krøv, sí fylgiskjal 1.

Vektingin, ið Gjaldstovan hevur valt at gera, er tað besta fyrisitingarliga boðið uppá, hvussu vit halda at útboðið skal vektast givið nógvar royndir, nógvar meiningar og nógv krøv.

Arbeiðið er ein samanseting av

- meginregluni, um ikki at seta krøvini soleiðis, at tað bara er eitt merki, sum uppfyllir krøvini
- krøvum í rundskrivinum
- nógvar royndir frá øðrum útboðum
- arbeiðsbólkin, sum hevur gjørt útboðstilfarið
- búskaparliga ráðgeving á stovninum og
- teir ráðgevarar, sum hava verið inni yvir uppgávuna.